DAGSINS MEINING

Áhugaverd gongd

Nú lítið hevur verið at frætta um oljuleiting her heima í eina tíð, og nú tað er sannlíkt, at tað neyvan verður nøkur boring á landgrunninum fyrr enn í 2005 ella í 2006, sum er seinasta freist at bora teir fýra írestandi brunnarnir í 1. útbjóðing, so eru tiðindini frá risastóra amerikanska oljufelagnum ChevronTexaco um, at tað fer at bora ein brunn skamt frá markinum í summar sera kærkomin. Og nú verður so meldað út í tíðindaskrivi frá felagnum, at tað er farið í samstarv við kenningar, sum eru virknir á føroyska landgrunninum, nevniliga norska Statoil og danska Dong.

Hetta kann bara ljóða væl í oyrunum hjá teimum, sum helst síggja, at oljufeløgini halda fram við sínum virksemi á Atlantsmótinum hóast væntandi úrslit í mong ár. Nettupp Statoil og Dong eru oljufeløg, sum eru rættiliga virkin við Føroyar, og at tey nú "farma" inn í eitt loyvi í bretskum øki so nær markinum eisini, kann bara bera boð um, at tey framvegis trúgva uppá Atlantsmótið.

Í tíðindasendingini í Útvarp Føroya mikukvøldið segði stjórin í Statoil, Rúni Hansen, at teir síggja samstarvið ChevronTexaco nær markinum sum ein møguleika at fáa sær týðandi vitan, ið kann brúkast í leitingini við Føroyar eisini. Hetta eru áhugaverd úttalilsi, nú vit vita, at brunnurin, sum Statoil og hini feløgini fara at bora hinumegin markið í summar, liggur ikki so langt frá økjum á føroyska landgrunninum, sum helst verða boðin út í komandi útbjóðing.

Vit kunnu ikki annað enn lesa burtur úr hesum tíðindunum, at eitt felag sum Statoil, fer at liggja rættiliga frammaliga, tá boðið verður út aftur á landgrunninum. Og um vit nú ímynda okkum, at samstarvið hinumegin markið við tað stóra samanlagda oljufelagið ChevronTexaco fer at bera veruligan ávøkstur, so átti ikki at verið óhugsandi, at nettupp hesi bæði stóru feløgini – møguliga saman – fara at bjóða uppá teigar í 2. útbjóðing – og ein kann eisini ímynda sær við tí áhuga tey vísa fyri leiting sum heild á Atlantsmótinum, at tey koma at vera flaggskipini í eini nýggjari rundu, tvs. tey feløgini, sum møguliga fara at vísa hinum feløgunum vegin og draga tey við. Harvið er ikki sagt, at onnur feløg, sum eisini hava víst økinum ans, so sum BP, Amerada Hess, ENI og Anadarko, ikki eisini fara at vera virkin í eini komandi rundu. Tað vil tó altíð vera gott fyri eitt nýtt øki, at tað eru fleiri stór feløg við drúgvum royndum og orku, sum ganga undan. Vilja onnur eisini tað, so ongantíð betur.

Vit kunnu í hvussu er bara staðfesta við teimum seinastu tíðindunum um samstarv millum Statoil, ChevronTexaco og Dong, at lív er í aftur leitingini á Atlantsmótinum, og tað kunnu bara vera góð tíðindi til allar føroyingar, nú tað kanska meira enn fyrr, verður brúk fyri at fáa búskapinum fleiri bein at standa á.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Skulu børn verða vrakað?

Opið bræv til løgtingið og landsstýrið

Dugir, dugir ikki. Dugir, dugir ikki. Er tað vegurin, vit skulu fara, tá ið ræður um komandi ættarlið?

Skulu vit skilja millum børnini, hvør ið skal fáa loyvi til at liva, og hvør ið skal doyggja?

Í ymiskum blaðgreinum hesa seinastu tíðina hevur tað verið sæð sum eitt framstig, at vit nú eru før fyri at kunna finna uppaftur fleiri børn, sum liða av Downs syndrom (ella mongolismu). Ikki tí at vit kunnu lekja ella linna um hjá teimum, men einans fyri at fáa tey skild burturfrá. At hugsa sær til, hvat ið vit kundu spart, um hetta slagið av børnum varð vrakað ...

Føroya Pro Vita vil í hesum sambandi heita á landsstýrið og løgtingið um at leggja fram og samtykkja tað lógaruppskotið, sum var á lofti í 1993, og sum er soljóðandi:

»Løgtingið samtykkir at gera greiðar reglur fyri fosturdiagnostikki, ið seta bann fyri tí slagi, ið einans hevur til endamáls longu í móðurlívi at velja út tey børn, sum hava álvarsamt brek ella sjúku, til møguliga týning, og somuleiðis seta bann fyri diagnostiskum hátti, sum ber í sær vanda fyri at elva til sjálvkravda misføðing ("spontan abort").« (Løgtingsmál nr. 136/1993: Reglur fyri fosturdiagnostikki.)

Føroya Pro Vita
Álvur í Mittúni, Klaksvík,
Doris Heinesen, Klaksvík,
Marna Ellingsgaard, Klaksvík,
Peter O. K. Olofson, Klaksvík,
Elspa Sørensen, Norðragøta,
Sofus Gregersen, Fuglafjørður,
Eirikur Skála, Argir.

NB: Felagið Javni skal fáa stóra tøkk fyri kærleika teirra til børnini og arbeiði, tey gera fyri tey.

Gloymir tú … at minnast

Bókmentatiltøk við Johannes Møllehave og Einar Már Guðmundssyni á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn

Kanska er ringt at minnast …

Kanska hevur søgan fingið ein listarligan dám

Johannes Møllehave er kendur fyri tær mongu bøkurnar, hann hevur skrivað. Millum best umtóktu endurminningar hansara er tann fyrsta: »På myrernes fodsti« og tann higartil seinasta »Som en springande hval«. Á føroyskum kenna vit hann frá bókini »Bibliusøgur« sum kom út í 2000. Johannes Møllehave greiðir á bókmentakvøldinum frá um at skriva endurminningar og vísir, hvussu hann hugfer minnið.

Einar Már Guðmundsson er tann mest umsetti av íslendsku høvundunum, sum eru føddir eftir annan heimsbardaga. Hann fekk í 1995 bókmentavirðislon Norðurlandaráðsins. Hann býr í Reykjavík og hevur skrivað yrkingasøvn og skaldsøgur – av teimum er tann kendasta »Einglar Alheimsins« sum er umsett til føroyskt. Seinasta skaldsøga hansara, kom út á donskum í heyst undir heitinum »Navnløse veje«, og varð sera væl móttikin.

Einar Már Guðmundsson skrivar í sínum bókum ofta um egnar upplivingar og um upplivingar hjá familjuni, og hann kemur bæði at umrøða sínar bøkur og tann leiklut minnini hava í ritverkinum.

At enda fara Johannes Møllehave og Einar Már Guðmundsson m.a. at samrøða um endurminningar og um munin á at minnast og at koma til hugs.

Bókmentatiltøkini verða 29. februar kl. 16 og 19,

Atgongumerki á 150 kr. kunnu keypast ella bíleggjast á Norðurbryggjuni, tlf. 3283 3700
bryggen@bryggen.dk

Bíløgd atgongumerki eiga at verða heintað ein tíma undan tiltakinum, sigur Norðurbryggjan í tíðindaskrivi.

Fundur um astma og allergi

TÍÐINDASKRIV
frá Føroya Astma/ Allergifelag

Yvirlæknin og barnalæknin Fróði Joensen greiðir frá um astma/allergi hjá børnum tann 6. mars 2004 í MBF-húsinum kl. 15. Høvi verður at seta spurningar.

Í summar vóru 2 føroyskar gentur á summarlegu í Danmark 14 dagar. Summarlegan er ætlað fyri børn og ung í aldrinum 10 til 17 ár. Genturnar greiða frá uppihaldinum har. Myndir verða vístar.

Øll kunnu vera við, ikki bara á fundinum, men eisini á summarleguni, tí stuðul kann útvegast. Høvi verður at seta spurningar. Drekkamunnur við onkrum afturvið.

Aftaná verður aðalfundur felagsins.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

At skriva føroyskt

Ólavur Hátún

Við millumbilum kemur alment fram um, hvussu illa stendur til við førleikanum at skriva føroyskt. Soleiðis frættist herfyri um kanning, sum vísti, at tey ungu nú á døgum duga illa at stava, eru ráðaleys um bendingarendingar og hava lítið skil fyri, hvussu farast skal um ð-ini.

Spurt hevur mangan verið, hvør orsøkin man vera til vánaligu støðuna í skrivligum føroyskum. Ov fáir tímar til lærugreinina í skúlanum, halda fleiri, lærararnir eru ikki nóg dugnaligir og teimum vantar frálærutilfar, siga onnur, og onkur hevur hug at geva næmingunum skyldina.

Mær er ongin ivi um, at aðalorsøkin til trupulleikan er skriftmálið sjálvt. Tað hevur alt ov lítið við okkara móðurmál at gera. Ofta er mær runnið í huga dømið, vit í sínari tíð hoyrdu um í sálarfroði, at um tað er ein upptrektur leikafuglur og ikki ungamamman sjálv, sum rørir seg í nánd, har ungar koma úr eggum, so fara ungarnir at halda seg til manngjørda lutin heldur enn til mammuna. Nakað soleiðis tykir mær tað at vera við okkara skriftmáli, at fólk hava viljað hildið seg til leikafuglin, næstan líka so bæriligur í útsjónd sum íslendska fyrimyndin, í staðin fyri at halda seg til ektaðu mammuna, okkara føroyska mál.

Veruleikin er jú tann, at málið er vorðið kroyst inn í ein skrivligan búna, eina miðaldar-brynju, sum tað langt síðan er vaksið frá, og tí hylkir og pínir, sum tað ger.

Ikki kann tað bara leggjast heiðursmanninum V.U. Hammershaimb til last, at vit komu út í hetta málsliga óføri, tí vitað er, at tað vóru aðrir, filologar á høgum stoði sum íslendingurin Jón Sigurðsson, danski professarin N. M. Petersen og norski søgu- og málfrøðingurin P. A. Munch, sum hóast avmarkaðan kunnleika til og tí lítla virðing fyri okkara máli og viðurskiftum vildu leggja Hammershaimb, ungur á aldri, lag á, hvussu tað mikla mentanartilfar av mannamunnni, sum hann hevði savnað, átti at verða fest á blað. Okkara skriftmál gjørdist tí eitt málsøguligt fyribrigdi fyri tey lærdu og ikki nakað fólksins samskiftisamboð.

Mikil orrusta hevur verið um hetta evni - ja, so harðligt var stríðið í sínari tíð, at tað skapti óvinskap, voldi klovning í okkara mentanarheimi og enntá beindi fyri vónríka "Føringa-felag". Tað er tí ikki løgið, at fólk hava ikki nóg fullfíggjað til kunna standa á egnum beinum. Tí máttu spjálkar leggjast á í skriftmálinum, og leiðin mátti vera tann etymologiska aftur í miðaldarligu íslandssøgurnar.

Men kann tað vera rætt bara at taka tíðarbilið um 12. og 13. øld, tá hesar fornsøgur vórðu festar á blað, burtur úr málsøguni og siga, at har hava vit okkara málsliga støði? Hvat mundi Gøtu-Tróndur sagt um málburðin hjá Snorra Sturlasyni? Á Tróndar og Sigmundar døgum talaðu bæði føroyingar og íslendingar øðrvísi enn hesi 2-300 árini seinni. Lat okkum hyggja at orðaljóðinum á yngra Jellinge-steininum í Jyllandi um ár 985, sama mundið sum Føroyingasøgu-tíðin, tá danir, sviar, norðmenn, føroyingar og íslendingar tosaðu mestsum sama mál: *: haraltr : kununkR : baþ : kaurua kubl : þausi : aft : kurm faþur sin auk aft : þaurui : muþur : sina : sa haraltr : ias saR . uan . tanmaurk ala . auk . nuruiak. auk . tani karþi kristna* ("Haraldur kongur beyð gera henda minnisvarða eftir faðir sín Gorm og móður sýna Týru, tann Haraldur, sum vann sær ræði á allari Danmørk og Noregi og gjørdi danir kristnar"). Hetta er jú heldur øðrvísi málburður enn tann fornnorrøni í íslandssøgunum, og soleiðis kundi verið hildið á at leitað eftir málsliga upprunanum - heilt aftur til Adam og Evu, um tað hevði ligið fyri.

Øll mál broyta seg við tíðini, og er orsøkin ikki týnandi ávirkan uttanífrá, men heldur tað, at málið av egnum ávum lagar seg eftir samfelagsrákinum, er ikki talan um afturstig. Lat okkum taka eitt svenskt dømi úr miðøld (um 1300 - um somu tíð, sum "Seyðabrævið" okkara varð skrivað): *Fyrsti laghmaþer var Lumbär, oc af hanum äru Lums lagh callädˌ fore þy at han sighs hawä huxät oc görˌ en mykin lot af laghum warum ... Han war heðen.* ("Fyrsti løgmaður var Lummur, og eftir honum er Lums lóg kallað, av tí at hann sigst hava hugsað og gjørt ein stóran part / miklan lut / av okkara lógum ... Hann var heiðin ").

Hetta dømið vísir, hvussu langt nútíðarsvenskt er komið burtur frá formálinum - hetta kundi jú eins væl verið gamalt føroyskt. Neyvan nakar svenskur málfrøðingur man meta hesa málsligu broyting sum eina afturgongd. Gevið gætur, at sviar tá høvdu bæði þ og og ð í teirra skriftmáli. Av hesum báðum er þ-ið tað fornara, er longu at finna sum rúnustavur, sum sæst á fyrra døminum. Tá nú okkara skriftmál skuldi hava tørv á at gerast pyntiligt, vera "tækkeligt af udseende", hættað sær at taka málið uppaftur til viðgerðar; men nú tá meira enn hundrað ár eru runnin síðan hetta syndarliga eljustríð, og vit hava fingið málstovn við hópin av vælútbúnum fólki, má tíðin vera komin til at endurskoða skriftmálið, tí tað kann ikki framhaldandi vera so, at meginparturin av okkara fólki bara skal yppa øksl og illa hætta sær at festa orð á blað, tí "eg dugi ikki føroyskt".

Tað *ber* til at læra kópar og delfinir at lofta við bøltum og elefantar at standa á einum beini, og tann úrmælti lærarin kann eisini koma væl á leið við teim gløggu næmingunum at læra teir at snúgva sær millum teir mongu fótonglar, sum liggja í okkara skriftmáli. Men tú kannst díkja so nógv á føroysktlærarnar, sum tú vilt, skaffa til vega allmikið av læribókatilfari og seta óavmarkað tal av til føroyskt á tímatalvuna hjá børnunum, tað at fáa lært at skriva móðurmálið verður verandi ein trupulleiki hjá fjøldini av Føroya fólki, um ikki broyting fæst í.

Í 1996 varð pallfundur hildin í Norðurlandahúsinum í sambandi við, at 100 ár vóru liðin, síðan uppskotið um "Broyting" - ein semja millum viðhaldsfólk hjá Hammershaimb og tey, sum ynsktu eina tillaging móti talaða málinum, sum dr. Jacobsen mælti til - varð lagt fram. Áhugaverdur var fundurin, og fleiri við mær mundu vóna og vænta, at nakað skilagott fór at spyrjast burturúr. Okkurt smávegis endurljóð sást eisini í bløðunum eftir fundin; men tá so formaðurin í Málnevndini kom við teirri niðurstøðu, at "Best man vera, sum er", stóð fast aftur, og meira varð ikki grett um málið.

Mótstøðan móti allari broyting ella tillaging av hesum viðurskiftum tykist byggja á tann ótta, at fert tú at pílka við verandi skriftmál, er vandi fyri, at alt fellur saman sum korthús. Hesin óttin hevur so aftur stoði í teirri sannføring hjá fyrst og fremst omanfyri nevndu útlendingum, at føroyskt skuldi ikki vera nakað veruligt mál, bert niðurslitnar loyvdir eftir av tignarliga fornmálinum og sum Hammershaimb tekur til í innganginum til antologiina, so mátti tað verið so lagamanni at fingið eisini þ-ið við inn í rættskrivingina. Hugsið **þ**ykkum, hvussu **þ**ekkiligur **þ**áttur **þ**að hevði verið í okkara skriftmáli eisini at kunnað skrivað þ! Tá var bara at greitt frá, at t-ljóðið hjá okkum stundum var at skriva við t og stundum við þ á sama hátt sum við a ella æ, i ella y, í ella ý, dn ella rn, dl ella ll fyri ikki um at tala, at tað stundum er týdningarmikið at skriva ð, meðan sami orðaformur stundum ikki má hava ð.

"Uttan kvæðini, Svabo og Hammershaimb hevði verið illa statt við føroyskum í dag", hoyrir tú mangan. Nei, hatta haldi eg ikki. Mín sannføring er, at málsliga samskifti her á landi í bø og í haga, á floti, undir húsaveggum og innadura í roykstovum hevur verið líka so ríkt og tignarligt upp gjøgnum øldirnar sum eitt nú á íslendskum bóndagørðum. Sagnirnar vísa tað og somuleiðis kvæðini, sum so eyðsýnt hava lagað seg eftir málmenningini hesi fimmsekshundrað árini, vit hava havt egið mál. Áhugavert er at lesa eina endurgeving í bókmentasøgu Christians Matras úr kvæðabindi hjá Napoleon Nolsøe, skrivað í 1840, sum hann kallaði "Qvæabók um fodna Manna Rojsnir frá fisti Findartui". Matras endurgevur brotið við nútíðar stavseting: *"Tað má vissarliga haldast fyri eitt tekin, sum valla finnst makin til, at øll tann mongd av táttum og kvæðum, sum finnst her á landi, kunnu hava hildið so væl í so mong hundrað ár, tó at tey ongatið hava verið uppskrivað. Likaleiðis hevur tað gingið við okkara føroysku tungu; hon hevur hildið seg higar til dags ... rein og óblandað ..., tó at tann danska tunga hevur verið okkum páskotrað í meira enn 400 ár ...".* Ikki hevði hann tikið soleiðis til orða, um málsliga støðan var so vánalig, sum Svabo fimti ár frammanundan gramdi seg um.

Sjálvur hevur Hammershaimb fynduga málburð føroyinga á orði í fyrrnevnda inngangi, og í hesum sambandi kann frá seinni tíð eisini endurgevast t.d. úr ævisøgubrotum hjá Jákupi Dahl, prósti um, tá sumbingar komu til handils í Vági: *"...Tíðindafróðir vóru teir, hart og treystligt og klingandi talaðu teir, ... og væl sótu orðini ...".* Hans Iversen, sáli, sum sjálvur var úrmælingur at taka til orðanna og varð sagdur at vera tann orðfimasti millum løgtingsmenn, fortaldi einaferð, hvussu hugtikin hann kundi sita og lýða á teir gomlu kollfirðingarnar, so væl teir dugdu at málbera seg. Og sig so at lesa bókmentir t.d. hjá Heðini Brú og Sigurði Joensen, har niðurarvaða bygdamálið ríkt og mergjað kemur prýðiliga sjóndar.

Jú, saktans hevði okkara móðurmál havt uppiborið ein skrivligan búna, ið betri hóvaði til málsliga veruleikan. (Meira)

Eiga at seta lógarkrav um vetrardekk

– Vit áttu at havt krav um, bilar vóru skøddir í hálku, heldur Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Superdekk í Havn
Mynd: Álvur Haraldsen

– Vit eiga at áseta lógarkrav um nýtslu av vetrardekkum, heldur Fríðrikur Bláhamar, sum heitir á løgting og landsstýrið um at taka málið upp

FERÐSLUTRYGD
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

– Tað er ikki rætt vorðið, at vit púra lógliga kunnu koyra við bili, sum er skøddur við summardekkum, í slíkum kavaveðri, vit hava havt seinastu dagarnar.

Hetta sigur Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Superdekk í Havn.

Hann hevur sent bræv til løgtings- og landsstýrismenn, har hann ger vart við hesi viðurskifti.

– Dekkini eru tey, ið hava sambandið við vegin, tá ið tað snýr seg um at hava fótafesti og koyra trygt.Tí nyttar tað lítið, at vegirnir og bilarnir eru góðir og tryggir, um ikki dekkini eru í lagi, sigur hann.

Fríðrikur Bláhamar heldur, at krøvini til dekk sum eru, eru alt ov lin. Hann heldur, at færri ferðsluóhapp kundi verið, um bilarnir høvdu røttu dekkini.

– Hetta vita vit eisini frá kanningum uttanlands, sigur hann.

Í Føroyum er lógarásetta kravið, at tað skal vera »dekk á øllum hjólum við mynsturdýpd í minsta lagið 1,6 mm á bili til í mesta lagi 9 persónar og bili við loyvdari heildarvekt uppá í mesta lagi 3.500 kr. Á øðrum bilum skal mynsturdýpdin vera í minta lgi 1 mm.«

– Í øðrum londum er kravið nógv meira útgreinað, serstakliga í londunum á okkara breiddarstigi, har koyrilíkindini eru nógv verri enn í Danmark, serliga um veturin, heldur Fríðrikur Bláhamar.

Hann heldur,at trupulleikin er møguliga, at vit í Føroyum kopiera lógir, ið ikki hóska til føroysk viðurskifti.

– Í Danmark er einki krav um, at tú um veturin skalt koyra við vetrardekkum, tí har eru góð koyrilíkindi so at siga alt árið, heldur Fríðrikur Bláhamar.

Í Noreg, Svøríki og Finnlandi hinvegin, ið veg- og veðurliga eru líkara okkum, eru krøvini øðrvísi.

– Í Svøríki og Finnlandi skal tú nýta vetrardekk, og í Noreg skalt tú nýta kavaketur ella vetrardekk. Í øllum trimum londunum skulu vetrardekkini hava eina mynsturdýpd við í minsta lagi 3 mm. Í Eysturríki er kravið tí mynsturdýpd á vetrardekkum í minsta lagi 4 mm, sigur Fríðrikur Bláhamar, dekksølumaður í Havn, sum heitir á landsins kosnu menn og kvinnur um at broyta hesar ásetingar, ferðslutrygdini at frama.